

*Hesi vórðu savnaði aftur eftir 40 ár. Tey vórðu fermd í Skála kirkju, 20. oktober 1963. Henda myndin er tikin, 26. oktober 2003. Tey eru, aftasta rað f.v: Jónfríður Petersen, Ingolf Lamhauge, Hervør Christensen, Leivur Højgaard og Tummas M. Jacobsen. Næstaftasta rað, f.v.: Sigrun Petersen, Eyðbjørg Jacobsen, Marita Joensen, Marita Lamhauge, Eydna Hjalt, Jonny Dalsgarð, Hans Olav Hansen og Janus Jensen. Næstfremsta rað, f.v: Jóngerð Lamhauge, Hannelin Petersen, Jónhild West, Edith Lamhauge, Sigrun Magnussen, Lydia Justesen, Eydna Poulsen, Jórun Poulsen, Annelisa Højsholt og Elin Jacobsen. Fremsta rað, f.v: Kára Djurhuus, Asta Iversen og Marna Knudsen. Palli Højgaard, sum eisini var við, vantar á myndini.*

# Konfirmantar hittust aftur eftir 40 ár

**Hervør Christensen, sum er ættað av Skipanesi og Annelisa Højsholt, fødd Simonsen, ættað av Høgabóli í Saltangará, komu úr ávikavist Brasiliu og Fjóni at verða saman við konfirmantunum, sum vórðu fermdir í Skála kirkju fyri 40 árum síðan**

MERKISDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

20. oktober 1963 var konfirmatión í Skála kirkju. Prestur var Poul Jacobsen, sum var prestur á Nesi í fleiri ár. 44 ungdómar vórðu fermdir hendan dagin.

26. oktober í ár hittust 27 av hesum fólkum aftur til hugna og samveru, men hesaferð vóru tey so 40 ár og seks dagar eldri enn í 1963, tá ið lívið og framtíðin lá opin fyri teimum.

Dagurin byrjaði við, at nú tilkomnu konfirmantarnir leitaðu aftur á "gamlar gøtur". Tey fóru í Skála kirkju til gudstænastu og altargongd, har Jógvan Fríðriksson, prestur, prædikaði. Jógvan, sum av sonnum hevur orðið í sínari makt, helt eina frálíka prædiku, og meira enn ta einu ferðina hoyrdist látur í kirkjuni hendan dagin!

Eftir gudstænastuna, tók Judith Johannesen, fotografur, myndir av "konfirmantunum" í Skála kirkju. Tað var eisini Judith, sum tók myndina fyri 40 árum síðan, men tað var so við einum øðrum myndatóli enn tí, hon nýtti hendan dagin.

Eftir at myndatøkan var liðug, bar leiðin yvir á Toftir, har Werner Olsen skipaði fyri frálíkum døgurða á Svangaskarði.

Eina stilla stund mintust tey felagarnar, sum farin eru hesi 40 árini; tey eru Sverri Danielsen av Nesi, Palma Hansen og Jákup Lamhauge, bæði av Toftum.

Janus Jensen, sum hevur verið lærari í mong ár, var millum konfirmantarnar fyri 40 árum síðan. Hann hevði gjørt eitt sanghefti, sum sungið varð úr undir døgurðanum. Við døgurðaborðið mintust tey aftur á farnar dagar, bæði í gaman og álvara.

Av Svangaskarði bar leiðin út í gamla prestagarðin á Nesi, har konfirmantarnir í sínari tíð gingu til prest. Á vegnum út hagar, steðgaðu tey í kirkjugarðinum á Nesi, har bómur vórðu lagdar á grøvina hjá Jákupi Lamhauge. Sverri er grivin í Danmark og Palma í Tórshavn.

Gamli prestagarðurin á Nesi er nú vorðin fornminnissavn í Nes kommunu, og hendan dagin tók Regin Debes hjartaliga ímóti.

Í prestagarðinum fingu tey kaffi og køkur, og nógv varð prátað og sungið hesa hugnaligu løtu.

Tíðin rann skjótt hendan dagin, og klokkan var út við 20, áðrenn hvør fór til sítt.

Tey, sum skipaðu fyri, at konfirmantarnir fyri 40 árum síðan nú kundu hittast aftur, takka øllum sum vildu vera við hendan dagin og gjørdu dagin so hugnaligan og minnisríkan.

Tey takka eisini Jógvani Fríðriksson, presti, fyri góð og gevandi orð í kirkjuni, Judith Johannesen fyri myndatøku, Werner Olsen fyri frálíkan døgurða og Regini Debes fyri gestablídni.

Leggjast kann aftrat, at Hervør Christensen, sum er ættað av Skipanesi og Annelisa Højsholt, fødd Simonsen, ættað av Høgabóli í Saltangará, komu úr ávikavist Brasiliu og Fjóni at vera við hendan minnisríka dag.

Hervør, sum hevur búð eini 27 ár í Brasiliu, er sjúkrasystir. Annelisa, sum býr á Fjóni, er pedagogur.



*Her síggja vit teir 44 konfirmantarnar, sum vórðu fermdir í Skála kirkju, 20. oktober 1963 - ella fyri 40 árum síðan. Judith Johannesen, fotografur á Toftum, hevur tikið báðar myndirnar*



Offshore Faroes sett:

# Mugu vita hvar leiðin gongur

**Eyðun Elttør, landsstýrismaður setti oljuráðstevnuna Offshore Faroes 03 í Norðurlandahúsinum í gjár. Hann helt fyri, at tað er gott at vit eina ferð um árið gera status um, hvat er komið burtur úr og hvar leiðin gongur**




*Eyðun Elttør setti oljuráðstevnuna*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

RÁÐSTEVNA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Hóast oljuleitingin við Føroyar er í einum aldudalu í løtuni og í eini bíðistøðu, so vár kortini fitt av fólki komið til 3. Oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum, sum Oljuvinnufelagið skipar fyri. Tað var Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum, sum setti ráðstevnuna og beyð føroyingum og útlendingum vælkomin. Hann fegnaðist um, at ráðstevnan varð vorðin ein fastur táttur á hvørjum árið og vónaði, at hon var komin fyri at vera. Hann helt tað vera neyðugt at steðga á við eitt slíkt høvi og hyggja at, hvat er komið burtur úr, hvar vit standa í løtuni og hvar leiðin gongur, hvat vit ætla.

Herálvur Joensen, aðalstjóri í oljumálaráðnum greiddi síðani frá komandi útbjóðing. Um umleið tvær viku verður greitt, hvørji feløg hava nominerað teigar á landgrunninum. Sum skilst eru fleiri av størri oljufeløgunum sinnað til at vera við í eini komandi útbjóðing. Tað áhugaverda verður so eisini at frætta, hvørji "smærri" oljufeløg kundu hugsað sær at verið partnarar hjá størri oljufeløgum, sum kunnu hugsa sær at vera fyristøðufeløg, operatørar í eini nýggjari rundu. Hugsandi er at eitt felag sum ChevronTexaco, sum var við í fyrstu útbjóðing men ikki fekk leitiloyvi, verður við aftur og fer at bjóða uppá teigar norðanfyri tætt upp at markinum. Sama felag hevur teigar í bretskum øki fyri norðan og eisini tætt upp at markinum.




*Herálvur Joensen umrøddi 2. Útbjóðing*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Craig MC Kenzie frá BP greiddi síðani frá arbeiðinum í Norðsjónum. Um føroyska landgrunnin segði hann m.a. at alt tað føroyska økið er sera komplext og tað krevur tí drúgvar kanningar at finna rætta staðið at bora á. Hann helt fyri, at BP vildi fyrireika seg væl, áðrenn tað fór undir aftur at bora við Føroyar, tí felagið ynskti ikki at bara á skeivum stað enn einaferð. Eftir tað greiddi Wilhelm Petersen stjóri í Atlants Kolvetni frá arbeiðinum og ætlanunum hjá felagnum í bretskum øki serliga. Hann legði dent á at felagið umframt at vera við í oljuleiting eisini vildi vera eitt framleiðandi felag í bretskum øki.



*Fitt av fólki hevði leitað sær í Norðurlandahúsið í gjár til oljuráðstevnu*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Seinasti fyrilestrarhaldarin fyrrapartin í gj ár var Jeremy Cresswell frá skotska blaðnum Press and Journal. Hann helt fyri, at tað er sera óheppið fyri Atlantsmótið, at oljufeløgini ikki leggja fram allar upplýsingar um sítt arbeiði. Hann helt, at alt ov nógv verður "dult" fyri almenninginum og at tað skaddi oljutilgongdina.

Seinnapartin í gjár skuldi ma. Sigurd í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfrøðissavninum tosa um basaltavbjóðingar eins og Gareth Allinson frá Statoil.